# Tjóðveldið heldur floksting við Gjógv

**Fríggjakvøldið og leygardagin verður flokstingið hjá Tjóðveldinum hildið á Gjáargarði við Gjógv**

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Flokstingið er hægsti myndugleiki hjá Tjóðveldinum, og er tað Eysturoyar Tjóðveldisfelag, sum hesaferð býður til tings. Á skránni eru eitt nú innkomin uppskot, formansfrágreiðing og innlegg frá landstýrisfólkum floksins.

Nú Tjóðveldið aftur er komið í landsins leiðslu, fer flokkurin á flokstinginum at stinga út í kortið.

Fríggjakvøldið er hin lógarfesti parturin á skránni við framløgdum roknskapi, vali av starvsnevnd, viðgerð av innkomnum uppskotum og atkvøðugreiðsla. Innkomin eru m. a tvey uppskot um broyting í viðtøkum floksins um uppstilling til løgtingsval, nú Føroyar eru eitt valdømi, og uppskot at samtykkja nýggja búmerki hjá flokkinum.

Leygarmorgunin klokkan níggju er formansfrágreiðingin hjá Høgna Hoydal fyrst á skránni - og síðani er orðaskifti um hana.

Eftir døgurða klokkan 13.00 fara landsstýrisfólkini at hava hvørt sítt innlegg um ætlanir og vónir til hetta samgonguskeiðið - ein tíma seinni er politiskt orðaskifti.

Allir miðlar eru bodnir við til flokstingið, og annars eru øll vælkomin á floksting hjá Tjóðveldinum, heilsar Eysturoyar Tjóðveldisfelag, sum eisini skipar fyri veitslu leygarkvøldið.


## HANDILSLÆRLINGUR

**Vit sóknast eftir einum lærlingi til okkara HVS-handil.**

**Tín førleiki**
Vit vóna at tú ert fyrikomandi, íðin, nærlagdur, sjálvstøðugur og skilur týdningin av góðari kundarøkt. FHS ella onnur miðnámsútbúgving er ein fyrimunur.

**Afturfyri bjóða vit**
Eitt starv har ið tú saman við øðrum kemur at taka tær einum spennandi og fjøltáttaðum handli. Tú fært møguleika at hjálpa og leiðbeina kundum okkara, samstundis sum tú fært ábyrgd og møguleika til at menna okkara handil – Stutt sagt eitt spennandi starv í einari fyritøku í støðugari menning.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er, **týsdagin 8. apríl.**

Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkara á tel. 312 000

**MARIA POULSEN PF**
Postmoga 182
FO-110 Tórshavn



Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo





## ÁRSAÐALFUNDUR

**Boðað verður til ársaðalfundar í Ognarfelag Tryggingartakaranna fríggjadagin 11. apríl, 2008 kl. 17 á Hotel Tórshavn**

Dagsskrá:

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í 2007
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar og hvussu avlop sambært roknskapinum verður nýtt, sí § 29, stk. 3, í viðtøkum felagsins
3. Val av nevndarlimum (einki val í ár)
4. Val av grannskoðarum
5. Møgulig uppskot, ið nevndin, stjórnin ella umboðsfólk ynskja at viðgera
6. Ymiskt

Allir tryggingartakarar í P/F Tryggingarfelagnum Føroyum eru limir í felagnum og hava rætt til at møta á aðalfundinum, men skulu í seinasta lagi 5 dagar frammanundan aðalfundinum skrivliga boða høvuðsskrivstovu felagsins frá luttøku.

Tórshavn, tann 27. mars 2008
Nevndin

OGNARFELAG
TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · FO-110 Tórshavn · Tel 345600 · Faks 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo



Atlantic Airways hevur 20 ára føðingardag

# Innbjóðing

Í sambandi við at Atlantic Airways fyllir 20 ár **fríggjadagin 28. mars**, verður móttøka í **Hangarinum á Flogvøllinum fríggjadag kl. 15 – 17.00**.

**Øll eru hjartaliga vælkomin.**

Atlantic Airways

www.sansir.fo



Tel 34 10 00 ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo